## Lønarútgjaldingar í fiskivinnuni nógv minkaðar

Lønarútgjaldingar í føroysku fiskivinnuni eru sera nógv minkaðar síðan 2003. Tað vísa tøl frá Hagstovu Føroya. Greið niðurgongd hevur verið í fiskiskapi síðan januar 2007, og sama tíðarskeið eru lønarútgjaldingarnar rapaðar niðureftir. Á indeksstiganum, sum byggir á ársbyrjan 2003, eru lønarútgjaldingarnar í fiskivinnuni nú komnar niður á knøpp 59 prosent av tí, tær vóru í 2003. Samstundis er talið av løntakarum í fiskivinnuni eisini rapað niðureftir, og eru tey arbeiðandi í fiskivinnuni bert 70 prosent av tí, tey vóru í 2003. Nøgdin á fiskiveiðuni hevur eisini verið fallandi, men síðan november 2008 hevur veiðan verið stórt sæð tann sama, meðan virðið á fiskinum er fallið støðugt.



# Tornadofundið týdning fyri Føroyaøkið

**So tætt við markið er nýggja fundið hjá Faroe Petroleum, at tað er sum at standa á molanum í Havn og hyggja út í hálvan Nólsoyarfjørð sigur Nils Sørensen, stjóri**

OLJUFUND
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

At kolvetni verða funnin so tætt upp at føroyska markinum kann fáa stóran týdning fyri leitingina við Føroyar. Hetta sigur Nils Sørensen, stjóri í Faroe Petroleum við Rás2. Hann staðfestir, at Tornado er eitt av trimum fundum gjørd eru seinastu árini, sum liggja rættiliga tætt upp at markinum. Tornado er bert tríggjar fjórðingar frá markinum. Eitt sindur longur norðari liggur Cambo, sum gongur enn tættari upp at markinum. Og norðan fyri Cambo liggur so Rosebank, sum er 8 fjórðingar frá markinum. Bæði í sambandi við Cambo og Rosebank hava verið gitingar frammi um, at tey kunnu ganga inn á føroyskt øki. Men tað fáa vit ikki váttað hvørki frá Amerada Hess og Chevron, sum eru fyritøðufeløg. Eiheldur frá Jarðfeingi.

Stjórin í Faroe Petroleum heldur tað hevur týdning fyri leitingina við Føroyar, at fund verða gjørd í bretskum øki, so tætt upp at føroyska landgrunninum. –Tað kann nevniliga siga okkum nakað jarðfrøðina her eisini, og so kann tað eisini vera tað trekkplásturið, sum skal til fyri at fáa altjóða oljufeløg at vísa Føroyaøkinum ans.

Nils Sørensen er sera spentur um komandi boringina á landgrunninum í apríl. Tá verður borað á Anne Marie leitimiðinum, sum er bert 15 fjórðingar frá Cambokelduni. Um Tornado vísir seg at vera rakstrarverdugt og at kolvetni verða funnin í Anne Mariebrunninum eisini, so verður tað ein endurreisn fyri gamla "Gullhornið", økið, har oljufeløgini boraðu fyrstu brunnarnar á landgrunninum men har teir flestu vórðu turrir.

- Hyggja vit eftir einum korti yvir fund og framleiðslur av olju og gassi í øll hesum økinum, so byrja vit so smátt at hóma eina nýggja oljuprovins, sum Føroyar helst eisini verða partur av sigur stjórin í Faroe Petroleum.




*Vit síggja hvussu tætt Rosebank, Cambo og Tornado eru við markið. Skulu vit ganga eftir hesum kortinum, so gongur Cambo heilt inn at markinum (og tvørtur um markið?) Eystari síggja vit mongu gassleiðirnar, sum eisini kunnu fáa óbeinleiðis týdning fyri Føroyaøkið*

*Kort: Dong*

*- Tornado er so nær markinum, at støð tú á molanum í Havn, so var oljukeldan út á hálvan Nólsoyarfjørð*



Bilvask
Vit vaska bilin innan og uttan.
Verkstaður
Dekk, oljuskift og smærri umvælingar.
Leigubilar
Persón- og vøruvognar. Góðir og bíligir bilar.
Flutningshjálp
Vit flyta bilar, maskinur o.m.a.
Stiðjagøta 3 · 100 Tórshavn · tel: 358888 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo
Skift dekkini hjá Bilrøkt
Opið er eisini leygardagar frá 10.00-13.00
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00-17.00 og leygardagar frá 10.00-13.00
BILRØKT
Borgar fyri góðsku...
SUVO ANTI-RUST
Vit hava nýmótans SUVO Anti-Rust anlegg til rustviðgerð av nýggjum og gomlum bilum. Eisini hava vit fólk, sum hevur spesialiserað seg í rustviðgerð.